# ppá longri sikt



## Suðuroyar Vinnuráð

Tað var í februar í ár, tá nógv varð tosað um kreppuna í Suðuroynni, at gjørt varð av at stovna eitt nýtt vinnuráð fyri alla oynna, heldur enn at eitt vinnuráð var fyri norðara partin av oynni og eitt fyri syðra partin. Tað er fyri at byggja brýr millum allar partar av Suðuroynni at gjørt varð av at hava eitt felags vinnuráð. Hetta stig kom í kjalarvørrinum av, at landsstýrismaðurin í innlendismálum vitjaði í oynni og ynskti at fáa eina felags rødd fyri vinnuna í Suðuroynni at samskifta við. Tim Wentslau, sum sjálvur er fyri at leggja allar kommunur saman í oynni, varð valdur til formann í nýggja ráðnum, sum enn ikki er farið til verka av álvara. Men nú verður tað. Ætlanin er at kalla inn til fund í vikuni ella næstu framtíð at leggja ætlanir fyri framtíðina.

Tim Wentslau er útbúgvin sivilverkfrøðingur. Hann hevur búð í Føroyum seinastu 7 árini og hevur føroyska konu. Hann hevur eitt virki á Tvøroyri, sum ger telduprogramm fyri orðblind og handicappað. Áðrenn hann kom til Føroya arbeiddi hann sum systemútviklari hjá Kommunernes Landsforening.

*Nýggi Smyril gevur nógvar nýggjar møguleikar*





umborð á Smyrli og at hetta tekur frá gistingarhúsunum í oynni. Til tað sigur Tim, at hjá fólki, sum kanska bert vilja vera í oynni í ein dag, har kann tað vera skilagott at yvirnátta umborð. Og eru fólk har í fleiri dagar, so kunnu tey jú fyrst búgva á hotelli og so fara umborð at sova ta seinastu náttina. Tað er eisini ein skilagóð kombination, tí tá nýtist tú ikki at fara heilt tíðliga upp á morgni og umborð. Her má bera til at fáa eitt samstarv.

Samanumtikið heldur formaðurin í Suðuroyar Vinnuráð, at tað nyttar ikki bara at sita hendur í favn og halda, at alt kemur av sær sjálvum. - Vit mugu eisini sjálvi vera virkin og koma við hugskotum til vørur og tænastur, sum fáa fólk at ferðast til Suðuroyar, eitt nú í sambandi við ferðavinnu. Kunnu vit fáa í gongd eina pendlaramentan, so vilja tað kanska vera handverkarar í Suðuroy, sum kunnu fara til arbeiðis í Havn á morgni og vera heima aftur tíðliga á kvøldi.